**Almanna- og Heilsumálastýrið**
*Starvsfólkadeildin*

# Deildarstjóri til Almanna- og heilsumálastýrið

**Eitt starv sum deildarstjóri í Almanna- og heilsumálastýrinum er leyst at søkja. Deildarstjórin skal virka sum stjóri á Almannadeildini, ið er ein trimum deildum í Almanna og heilsumálastýrinum. Talan er um eina nýstovnaða deild, sum deildarstjórin saman við starvsfólkunum skal skipa.**

**Deildarstjórin kemur sjálvur at mynda starvið, og fær harumframt góðar møguleikar fyri persónligari og fakligari menning.**

**Starvsøkið:**

Uppgávurnar hjá deildarstjóranum fevna m.a. um:
- ábyrgd av dagligu leiðsluni á deildini;
- ábyrgd av løgfrøðiliga arbeiðinum innan almannaøkið;
- ábyrgd av fíggjarstýring og fíggjareftirliti á øllum stovnum á almannaøkinum;
- ábyrgd av viðgerð av kærum, sum ikki eru lagdar til kærustovn;
- ráðgeving til stovnarnar innan almannaøkið;
- at aðrar uppgávur, ið eru viðkomandi fyri starvið, verða loystar á nøktandi hátt.

**Fyrimun hevur umsøkjari sum hevur:**

- útbúgving frá hægri lærustovni
- leiðsluroyndir
- kunnleika til almannaøkið
- evni at seta í verk fyriskipanir.
- góð leiðslu- og samstarvsevni.
- vitan um tær treytir, sum eru galdandi í einari politiskari fyrisiting.

**Løn og setanartreytir:**

Deildarstjórin hevur tilvísing til aðalstjóran, og er javnt settur við hinar deildarstjórarnar í aðalstýrinum.

Setanarøkið er alt aðalstýrið við tilhoyrandi stovnum umfram Løgmansskrivstovan og hini aðalstýrini.

Talan er um tænastumannastarv við setanartreytum sambært løgtingslóg um tænastumenn landsins.

Starvið verður lønt í 37. lønarflokki.

**Umsóknir:**

Umsókn við avriti av prógvum, C.V. o.ø. skulu sendast til:

**Almanna- og heilsumálastýrið**
att. Starvsfólkadeildin
Eirargarður 2
FO-110 Tórshavn.

Umsóknarfreist: 4.apríl kl. 12.00

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Aibritt á Plógv, aðalstjóra tlf. 304050.

# GRANNASTEVNA

Samb. lóg nr. 170 frá 18.05.1937 fyri Føroyar um grannastevnu v.m., verður boðað frá, at grannastevna fyri markatalsbygdina Sandur verður ætlandi:

**Týsdagin 16. apríl 2002 kl. 19.00**
**í Virkinum á Sandi**

**Til viðgerðar:** Mál um nýtslu av fiskirættindum, fiskikortum á Sandsvatni, Norðara- og Heimara Hálsvatni, ið er umfatað av lóg nr. 169 frá 18.05.1937, fyri Føroyar um nýtslurætt á vøtnum og í áum, við seinni broytingum.

Skal onkur møta og atkvøða fyri annan eigara, krevst fulltrú frá eigara, dagfest og undirskrivað av tveimum vitnum.

Á Sandi 15. mars 2002.

Ingibjørn Eldevig
**sýslumaður í Sandoyar sýslu**

# Til sølu

Ein Scania 112 við skiftilast–skipan.
Ein Scania 86 við krana. Bilurin hevur skaða.
Ein JCB rennugravari, árg. 86.
Ein sandgrabbi.

**Tlf. 210292**



**Ellis- & avlamisheimið í Vágum**

## Frítíðaravloysarir

Søkt verður eftir sjúkrasystrum, sjúkrahjálparum/-heilsuatstøðingum og heilsuhjálparum, húsavørði, ítrivs- og fysioterapeuti og ymsum hjálparfólkum.

Skrivlig umsókn verður at senda til heimið áðrenn 15. apríl 2002.

**www.sosialurin.fo**

Lesið **Sosialurin** -tað loysir seg

**SUDUROYAR SJÚKRAHÚS**
**800 Tvøroyri**

# Ergoterapeutur

Eitt starv sum ergoterapeutur er leyst til setan frá 1. juni 2002.

**Uppgávur**
Starvið fevnir í høvuðsheitum um at veita skjúklingum á Suðuroyar Sjúkrahúsi og búfólki á Ellis- & Røktarheiminum ergoterapeutiska tænastu.

**Yrkislig førleikakrøv**
Umsøkjarar skulu hava lokið prógv sum ergoterapeutur. Eisini verður dentur lagdur á starvsroyndir.

**Persónlig førleikakrøv**
Umsøkjarar skulu hava góð samstarvsevni, kunna arbeiða sjálvstøðugt, og verða til reiðar at royna nýggjar avbjóðingar. Somuleiðis skulu umsøkjarar tola broytingar í starvsviðurskiftunum.

**Starvsstaðið**
Starvsstaðið er fysiurgiska deild á Suðuroyar Sjúkrahúsi. Av tí at starvið eisini fevnir um búfólkini á Ellis- & Røktarheiminum, verður arbeitt har eftir tørvi.
Viðkomandi hevur beinleiðis tilvísing til yvirfysioterapeutin.

**Løn og setanarviðurskifti**
Løn og setanartreytir verða eftir sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og Føroyskir Ergoterapeutar.
Starvið hevur eina royndartíð uppá 3 mánaðir.

Nærri fæst at vita um starvið, við at venda sær til John Rødgaard yvirfysioterapeut tlf. 371133 lokal 115.

**Umsóknir**
Umsókn við avriti av prógvum v.m. verða at senda til:

**Suðuroyar Sjúkrahús**
Umsjónarmaðurin
Postboks 51
800 Tvøroyri

Umsóknarfreistin er 22. apríl 2002.

# Grundstykki til sølu

Eitt grundstykki í Blákollugøtu 5 í Havn er til sølu um hóskandi boð fæst. Stykki er byggibúgvi og lættligt at byggja á. Tað liggur sera væl fyri við góðum útsýni og nær við miðbýin.

Áhugað kunnu ringja

**217286 aftaná kl. 16.**

# Bilar til sølu

Opel Combo, árg. 97, km. 49.000.

Ein VW-Transportari, 2400 D, árg. 91, km 199.000.

**Tlf. 211531 ella 213331**



# NÝGGJ TELEFONNUMMUR

**VINNUMÁLASTÝRIÐ**
Telefonnr.
**35 60 60**
Høvuðsfaxnr. 35 60 65
og
faxnr. 35 60 66
faxnr. 35 60 79

**LANDSDJÓRALÆKNIN**
Nýtt telefonnr.
**35 60 80**
Nýtt faxnr. 35 60 85

**SKRÁSETING FØROYA**
Nýtt telefonnr.
**35 60 90**
Nýtt faxnr. 35 60 95

VINNUMÁLASTÝRIÐ

*P/F Frants Restorff*

## Vit sóknast eftir fólki til fast starv til handilin

Arbeiðstíðirnar eru hesar:
kl. 06.00–13.00, kl. 13.00–19.00
kl. 19.00–23.30. Allar dagar í vikuni.

Løn eftir S og K

***Pf. Frants Restorff***
Tórsgøta 13 · Tlf. 311060
Postsmoga 41 · 110 Tórshavn

frants restorff

zarepta

# Páskastevna í Zarepta

Um Gud vil verður Bibliugransking í Zarepta á páskum fyri bæði ung og eldri, fyri øll yvir 17 ár

**Evnir:**
Tit skulu vera vitni míni (Áp. 1.8)
Jákup ættarfaðirin
Jákupsbrævið
Hebrearabrævið

**Tíð:**
Skeiðið byrjar mikukvøldið 27.3.02 og endar mánadagin, 2. páskadag 1.4.02

**Tilmelding:**
Áhugað verða biðin um at tekna seg innan fríggjadagin 22.03.02 á tlf. 312370 ella 315062

# Bátur við fiskiloyvi til sølu

*Væl útgjørdur seksaringur, 31 fót, til sølu um hóskandi boð fæst.*



Báturin er væl hildin, hevur 70hk sole diesel so gott sum nýggjan motor, VHF, radara 36 fj., sjálvstýrara, telefon, radio, plottara, ekkolod, kabys og gasplus, línuspæl og línurennu, 4 svenskar el. snellur, gummibát 4 pers. og mangt annað.

Um hetta hevur tín áhuga, so ring vinarligast og hoyr nærri.

**Tlf. 212504**

# Handilshølir

**við høvuðsvegin í Saltangará til leigu.**




**Tlf. 447421**

TÓRSHAVNAR KOMMUNA

# Málsviðgeri
## til
## kommunalu skattakærunevndina

**Starvsøkið**
Arbeiðsuppgávurnar fevna m.a. um at viðgera kærur hjá kommunalu skattakærunevndini, sum er kærumyndugleiki hjá skattgjaldarunum í Tórshavnar, Nólsoyar, Kirkjubøar og Hest kommunu.

Harumframt verður eisini talan um ymiskt annað arbeiði hjá Tórshavnar kommunu. Uppgávurnar verða fjølbroyttar í eini flextíðarskipan og geva viðkomandi møguleika fyri fakligari og persónligari menning.

**Førleikakrøv**
Umsøkjari skal hava útbúgving sum merkonom í roknskapi/skattarætti ella líknandi útbúgving. Hevur umsøkjari ikki neyðugu útbúgvingina ber til at taka hana eftir setan. Tað kann verða ein fyrimunur, at umsøkjari hevur royndir á skattaøkinum ella innan almenna fyrisiting. Kunnleiki til edv á brúkarastøði er neyðugur.

**Setanarviðurskifti**
Starvið er fulltíðarstarv og verður sett skjótast til ber. Lønar- og setanartreytir annars verða ásettar sambært sáttmálanum millum Starvsmannafelagið og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið.

**Meiri fæst at vita**
um starvið við at venda sær til Leif Madsen, deildarleiðara, ella Jens M. Poulsen, kommunustjóra tlf. 31 51 60.

**Umsókn**
við upplýsingum um útbúgving, arbeiðsroyndir og avritum av prógvum eins og møguligum viðmælum o.ø. skal verða Tórshavnar kommunu, Postboks 32, FO- 110 Tórshavn, í hendi í seinasta lagi 5. apríl 2002.

SNARSKIVAN

SJÓVAR KOMMUNA

# Kunngerð

**um framløgu av broytingum av byggisamtykt**

Sambært løgtingslóg nr. 13 frá 21. mai 1954, um byggisamtykt og býarskipan við seinni broytingum, verður við hesum gjørt kunnugt, at uppskot til broytingar av byggisamtyktini fyri Sjóvar Kommunu í samband við nýtt bústaðarøki inni í Bø, verður lagt fram til alment eftirlit á kommunuskrivstovuni frá 20. mars til 10. apríl 2002.

Møgulig mótmæli skulu verða skrivlig, og verða kommunustýrinum í hendi í seinasta lagið 20. juni 2002.

**Sjóvar kommuna**
490 Strendur

www.sosialurin.fo

www.sosialurin.fo